FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 5. oktober 2020
J. nr.: 20/00440
Viðgjørt: BM

Svar upp á fyrispurning nr. 22/2020 eftir tingskipanini § 52a

Fyrispurningur frá Kristinu Háfoss, løgtingsmanni, settur Jørgen Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um lægstu lønirnar, livikostnað og almennu lønarskipanina í Føroyum

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Heldur landsstýrismaðurin, at starvsfólk við lægstu lønunum – hóast hesi starvast fulla tíð – kunnu liva í fátækraváða í Føroyum?
2. Hvussu nógv er nú í miðal eftir at liva fyri um mánaðin fyri tey, ið hava lægstu mánaðarløn hjá landinum?
3. Hvussu nógv er lægsta mánaðarlønin hjá landinum hækkað seinastu 25 árini í krónum og %?
4. Hvussu nógv eru tænastumannalønirnar hækkaðar seinastu 25 árini í krónum og %?
5. Hvussu nógv er kostnaðarstøðið / prístalið hækkað seinastu 25 árini?
6. Heldur landsstýrismaðurin, at fleiri almenn størv hava størri krøv og krevja fleiri førleikar nú, enn áður?
7. Heldur landsstýrismaðurin, at almenna lønarskipanin er tillagað nøktandi, samsvarandi broytingunum í innihaldi og í krøvum til starvsfólk, seinastu mongu árini?
8. Ætlar landsstýrismaðurin at endurnýggja almennu lønarskipanina?

Svar til spurning 1 og 2
Lægsta mánaðarlønin, í sáttmála, sum landið hevur við fakfelag, er byrjanarlønin í sáttmálanum við Havnar Arbeiðskvinnufelag. Hendan lønin er í dag 20.633,21 kr. um mánaðin. Eftirlønargjaldið er 15%. Viðmerkjast kann, at lønin er ikki hækkað síðani 1. oktober 2018, og verður lønin nakað hægri enn nevnda upphædd, tá ið semja er gjørd fyri tíðarskeiðið frá 1. oktober 2019 til 1. oktober 2022.
Hvussu nógv er eftir aftaná skatt er tengt, at hvar viðkomandi býr v.m. Um roknað verður við meðal kommunuskattaprosenum, ið er 20,19% og viðkomandi rindar 0,6% í kirkjuskatti, so hevur viðkomandi 13.037 kr. um mánaðin eftir at liva fyri, tá ið skattur og avgjøld eru tikin av lønini.
Fátækraváðin er roknað hagtalsmát, sum tekur støði í samlaðu tøku húskisinntøkuni og húskis-samansetingini.
Ein persónur er í fátækraváða um viðkomandi hevur ein javnvirðisinntøku, sum er lægri enn 60% av javnvirðismiðinntøkuni í samfelagnum.

Javnvirðisinntøka er ein umroknað inntøka hjá hvørjum einstøkum, við atliti at vaksnum og børnum í húskinum. Øll í húskinum, børn og vaksin, fáa tillutað somu javnvirðisinntøku.

Javnvirðisinntøkan verður roknað, tí inntøkan hjá húskinum sigur meiri um, hvørjar nýtslumøguleikar tey einstøku í húskinum hava, enn inntøkan hjá tí einstaka. (www.hagstova.fo)
Húskini í Føroyum eru ymisk. Summi húski hava tvær inntøkur, summi eina. Onkur býr einsamallur. Summi búgva saman og hava eingi børn, meðan onnur búgva saman og hava børn.
Ein persónur er tí í fátækraváða, um húskið, sum viðkomandi býr í, er í fátækráváða.
Starvsfólk, ið fær fulla løn á byrjunarstigi hjá HAK hevur, sambært døminum oman fyri, eina tøka inntøku á 156.441 kr. um árið.
Seinasta uppgerðin av miðinntøkuni er frá 2018. Tá var markið fyri fátækraváða ein javnvirðisinntøka á kr. 147.614, og vil umrødda starvsfólk harvið hava eina inntøku, ið er nakað omanfyri markið fyri fátækaváða.
Fátækraváði er eitt roknað hagtalsmát, sum tekur hædd fyri samlaðu húskisinntøkuni og húskissamansetingini. Um talan er um stakan uppihaldara við einum barni hevði starvsfólk við nevndu inntøku eina eina javnvirðisinntøku, ið eru beint um markið fyri fátækraváða. Síðan 2018 er stuðulin til barnafamiljur hækkaður.
Tá Hagstova Føroya roknar húskisinntøkur, eru allar inntøkur og veitingar íroknaðar – eisini sosialar veitingar, sum t.d. familjuískoyti og barnaískoyti til stakar uppihaldarar. Sosialu skipanirnar eru við til at halda arbeiðandi barnafamiljunum, sum arbeiða fulla tíð, omanfyri markið fyri fátækraváða.

Svar til spurning 3
Fyrsti sáttmálin við Havnar Arbeiðskvinnufelag varð gjørdur í 2002, og tí fari eg at loyva mær at greiða tølini frá 2002 til í dag.
Tann 1. mai í 2002 var byrjanarlønin í HAK-sáttmálanum 16.016 kr. um mánaðin, umframt eftirlønargjald 4,6%, tilsamans 16.753 kr. um mánaðin.
1. oktober 2018 var byrjanarlønin í HAK-sáttmálanum 20.633 kr. um mánaðin, umframt eftirlønargjald á 15%, tilsamans 23.727 kr. Vøksturin í krónum er 6.974, vøksturin í prosentum er 42. Leggjast kann aftrat, at endalønin í sama tíðarskeiði er hækkað 52%, íroknað eftirlønargjald. Nevnast kann at eftirlønargjaldið er hækkað úr 4,6% uppí 15% og er ein partur av karminum brúktur til hækking av eftirlønargjaldinum. Sjálv endalønin er hækkað 38%.
Sáttmálin millum Fíggjarmálaráðið og Havnar Arbeiðskvinnufelag er fyri starvsfólk, sum starvast á stovnum hjá landinum, staðsettir í Tórshavnar kommunu. Starvsfólk innan somu arbeiðsøki í øðrum pørtum av landinum eru lønt sambært sáttmálanum millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og ymsu arbeiðarafeløgini.

Svar til spurning 4
Nakrar ferðir seinastu árini eru lønirnar hækkaðar heilt ella partvíst í krónum og ikki í prosentum. Prosenthækkingarnar eru tí ikki tær somu í ymisku lønarflokkunum. Lægru lønirnar eru hækkaðar eitt sindur meira enn tær hægri í prosentum.
Lønin hjá tænastumonnun varð seinast hækkað tann 1. oktober 2019.
Ad 4) Nakrar ferðir seinastu árini eru lønirnar hækkaðar heilt ella partvíst í krónum og ikki í prosentum. Prosenthækkingarnar eru tí ikki tær somu í ymisku lønarflokkunum. Lægru lønirnar eru hækkaðar eitt sindur meira enn tær hægri í prosentum.
Lønin hjá tænastumonnun varð seinast hækkað tann 1. oktober 2019.
Lønin í lønarflokki 28.4 var 24.661,96 kr. tann 1. mars 2002. Í dag er lønin 36.056,95 kr.
Hækkingin er 11.393,99 kr., og 46,2%.
Fleiri stjórar eru løntir í 38. lønarflokki, og har hevur hækkingin verið 43,9%

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Svar til spurning 5
Prístalið sum verður brúkt í dag bleiv sett til 100 tann 1. januar í 2001. Prístalið er hækkað lítið seinnu árini, og nøkur tíðarskeið er prístalið lækkað. 2. ársfjórðing í ár var prístalið 120,8. Viðmerkjast kann at frá 1. januar 2001 til 1. oktober 2019 hava hækkingarnar í sáttmálunum hjá landinum verið omanfyri 56%. Hetta umfatar hækkingar í lønunum eisini aðrar broytingar, ið eru tiknar av lønarkarminum t.d. hækking av eftirlønargjaldi og serstaka frívíkan. Hækkingarnar í lønarkarminum hava harvið verið meira enn dupult so stórar sum hækkingarnar í prístalinum.

Svar til spurning 6 Tað er tann einstaki stovnurin, sum setir fólk í starv og ásetur førleikakrøvini til einstøku størvini. Tað ber ikki til hjá mær at meta um, hvørt størri krøv og fleiri førleikar vera sett til starvsfólkini í dag enn fyrr, men eg fari ikki at vísa aftur, at hetta kann vera so.

Svar til spurning 7 Verandi lønarskipan hjá tí almenna er eitt úrslit av heilt nógvum sjálvstøðugum samráðingum, ið hava verið gjøgnum eitt longri áramál. Rættiliga nógvir partar eru í almenna samráðingarskipanini. Tað hevur tí víst seg at vera rættiliga trupult at gera størri broytingar.

Svar til spurning 8 Sambært viðmerkingunum til fyrispurningin arbeiddi fyrrverandi landsstýriskvinna fyri at gera almennu lønarskipanina meira smidliga, tíðarhóskandi og gjøgnumskygda. Í hesum arbeiði ikki kom langt. Harafturímóti var seinasta samráðingarumfar á almenna arbeiðsmarknaðinum eyðkent av rættiliga nógvum ósemjum og arbeiðssteðgum.

Tinganes, 05. oktober 2020

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum